# Stórfingin Mikines-framsýning

**100 verk av Mikines hanga í hesum døgum upp í Listaskálanum í Havn. Ongantíð áður hava so nógv verk eftir Mikines verið at síggja á okkara tjóðarsavni, og eisini ber til at síggja ein áhugaverdan film, har málarin sjálvur greiðir frá lívi sínum**

LIST
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*



Í dag læt stór listaframsýning upp við verkum eftir Mikines, ella Samuel Elias Fredrik Joensen, sum var hansara fulla navn. Tey umleið 100 verkini umboða fleiri tættir og tíðarskeið í stórfingna listaavrikinum hjá mykinesmálaranum.

Framsýningin verður hildin í sambandi við, at 23. februar í ár eru 100 ár liðin, síðan listamaðurin varð borin í heim í Innistovu í Mykinesi.

Hóast Mikines hevði ætlað sær tónleikin sum lívsstarv, so broyttust ætlanirnar, tá ið sviin William Gislander kom til Mykinesar at mála, tí at síggja svian skapa ein málning hugtók hann so mikið, at hann sjálvur fór at mála. Í hesum sambandi eru eisini verk hjá Gislander at síggja á sýningini, so at sjálvur íblásturin, sum setti listavirksemið í gongd hjá tí unga mykinesdreinginum, eisini sleppur upp í part.

Eins og føroysl listafólk flest fór Mikines at mála landslagsmyndir, har serliga føðioyggin, náttúran, fólkini og dramatiska veðrið vóru myndevni, sum við tíðini fingu daprari litir orsakað av vanlukkum og sjúkum.

Deyðin var ikki ókent fyribrigdi fyri Mikines, sum á ungum døgum misti pápa sín, yngri systkin og onnur bygdarfólk, ið sjólótust ella doyðu av tuberklum í bestu árum. Hóast henda tunga sorgin var persónlig og gjørdist eitt høvuðseyðkenni í verkunum hjá Mikines í 30'unum, so var hon eisini almenn, tí ikki var óvanligt, at føroyingar sjólótust ella doyðu av tuberklum um hetta mundi. Tí kundi tað ikki undra nakran, at myrku og døpru myndir hansara vóru so beinraknar.

Mikines málaði mangar andlitsmyndir av kendum og minni kendum føroyingum og av familjuni og sær sjálvum, og vóru tær ikki

*Helgi Fossádal við einum málningi frá 1952, sum vanliga hongur í Listaskálanum. ið eigur málningin. Mikines hevur málað á báðar síðar á løriftinum, og er hetta fyrstu ferð, at almenningurin sleppur at síggja forvitnisligu baksíðuna á hesum málningi*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

minni livandi, hóast myrku litirnir, sum eyðkendu deyðsmyndirnar, eisini vóru umboðaðir her.

### Málaði andlitsmyndir

Meðan Mikines var í Danmark, var alt samband millum Danmark og Føroyar kvett undir seinna heimsbardaga. Henda ósjálvbodna útlegdin og longsilin aftur til Føroyar fekk hann at fara undir sínar hugtakandi grindadrápsmálningar. Litirnir vóru ikki eins daprir og fyrr, men myndirnar vóru nógv ógvusligari, hvat rørslu og ferð viðvíkti. Tey longu og sveiggjandi pensilsstrokini vísa á, hvussu ódnarhugaðir og bráðsintir føroyingar kundu verða í grindadrápi.

Fleiri av hesum tættum eru sum nevnt við á framsýningini.

Helgi Fossádal, leiðari á Listasavni Føroya, greiðir frá, at Listasavnið eigur eini 60 verk av Mikines, men at øll hesi ikki eru við á framsýningini. Fleiri verk eru lænt frá peningastovnum, almennum stovnum og privatfólki, og sýningin er skipað og býtt í ymisk evni. Eitt nú eru tey døpru motivini av deyða og sjúku at síggja í einum rúmi, meðan landslagsmyndir, portrett og livandi myndir av føroyskum dansi og grindadrápi hanga í øðrum pørtum av framsýningini.

Helgi Fossádal, sum sjálvur hevur valt myndirnar út til framsýningina, greiðir frá, at Listasavnið roynir at leggja seg eftir at skipa fyri fleiri størri framsýningum og nevnir m.a. Munch-framsýningina herfyri, sum ein part í hesi røð.

Stórur áhugi hevur nevniliga verið fyri Mikines í fleiri ár, ið var ein av fyrstu føroyingunum, ið fóru at útbúgva seg innan myndlist, og hann var hin fyrsti føroyingurin, sum arbeiddi við myndlist burturav.

### Fimur og fotomyndir

Umframt Mikinessýningar í Føroyum, hava eisini størri framsýningar verið fyriskipaðar t.d. á Den Frie í Keypmannahavn og í Vejle, og til stuttleika kann nevnast, at uppboðssølan Bruun Rasmussen 129 ferðir hevur havt málningar hjá Mikines á sølulistanum.

Tað er tó ikki bert málningar hjá Mikines, sum tey ið leita sær í Listaskálan í Havn sleppa at síggja. Eisini fotomyndir frá m.ø. Politiken við Mikines saman við t.d. Ingálvi av Reyni og Fraser Eysturoy eru at síggja, har teir skoða list, hanga málningar upp og onnur motiv eru at síggja.

Eisini verður ein áhugaverdur filmur vístur, ið sonur málarans, Kári Mikines, hevur sett saman. Umframt at síggja myndir av oynni Mykinesi og livandi myndir av málaranum sjálvum, eru eisini samrøður at hoyra við listamannin, har hann við humori og livandi frásøguhátti greiðir frá lívi sínum, sum tó ikki altíð var ein dansur á rósum. M.a. er tað hugtakandi at hoyra, at hann varð biðin at syngja yvir líki longu sum smádrongur, tí hann hevði so góða rødd.

Framsýningin er opin til 12. mars, á grækarismessu, í ár.

Á sjálvum 100 ára degnum tann 23. februar kl. 19 verður serligt Mikineskvøld í Listaskálanum við fyrilestrum og tónleiki. Kári Mikines, sonur málarans, hugleiðir um pápan. Aðalstein Ingólfsson heldur fyrilestur um Mikines við heitinum „Mikines úr nýggjum sjónarhorni". Aðalstein Ingólfsson er savnsleiðari á Hönnunarsafns Íslands, og hann er í ferð við at skriva listabók um Mikines, ið kemur út seinni í ár.

# Bill heldur proportiónirnar vera skeivar

**– Miðflokkurin bjóðar seg fram á sama demokratiska grundarlagi sum aðrir flokkar, og proportiónirnar eru skeivar, tá ein samanber ein lítlan flokk sum Miðflokkin McCartyismuna, sigur Bill Justinussen til skuldsetingarnar frá LISA í blaðnum í gjár**

MENTANARSTRÍÐ
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

Nógv kjak verið hesa vikuna um myndirnar hjá Ole Wich, har hann m.a. hevur samantvinnað Merkið við orðið "homoFObia", og eftir at Bill Justinussen valdi at biðja fútan reisa ákæru ímóti listamanninum, og løgtingsmaðurin í sjónvarpskjakinum týskvøldið m.a. segði, at verkini ikki eru list, talaði Listafólkasamband Føroya at.

Í blaðnum í gjár segði nevndarlimurin í LISA, Oddfríður M. Rasmussen, m.a. at útsøgnirnar og atburðurin hjá tinglimi Miðfloksins minti um McCartyismuna í fimtiárunum.

Sjálvur metir Bill Justinussen, at støddarlutfallið í samanberingini hjá LISA eru skeivt.

– Miðflokkurin bjóðar seg fram á sama demokratiska grundarlagi sum aðrir flokkar, og proportiónirnar eru skeivar, tá ein samanber ein lítlan flokk sum Miðflokkin við eitt tílíkt fyribrigdi sum McCartyismuna, sigur Bill Justinussen.

– Listafólkini fýlast á, at ein politikari hevur meiningar um list, men tað eru tvey sløg av politikarum, nevniliga tey, ið hava egnar meiningar, og tey, ið hava meiningarnar hjá øðrum, sigur Bill Justinussen, ið sjálvur metir seg hoyra til tann fyrra bólkin, tí hóast hann er politikari, metir hann seg hava rætt til at hava meiningar um list.

– Tað er júst sum við mati. Eg dugi ikki so væl at gera mat, men eg kann hava avgjørdar meiningar, um maturin smakkar væl ella illa. Listin provokerar teg til at hava eina meining um seg, og ta meiningina kann ein og hvør hava, sigur Bill Justinussen, sum leggur dent á, at ein politikari er ein, ið hevur eina meining.

### Prippin

Spurdur, hvat hann sigur til at verða samanborin McCartyismu, sigur hann, at hetta man LISA hava gjørt fyri at skera út í papp, og hetta heldur hann vera gjørt so ofta fyrr, m.a. tá fólk hava kallað hvønn annan t.d. kommunist, sambandsfólk ella tjóðveldisfólk.

– Nú hevur orðið "prippin" verið brúkt so ofta. Vit kunnu eisini blíva prippin, tá vit verða kallað fundamentalist ella McCartyist. Vit taka avgjørt ikki undir við teimum niðurgerandi orðingunum, sum verða brúkt um samkynd, men hetta er ikki grundarlag fyri teimum proportiónum í tí, vit verða kallað. Vit hava líka stóra virðing fyri samkyndum, sum fyri øðrum menniskjum, sigur tinglimurin hjá Miðflokkinum.

Spurdur, hvat hann heldur um sjónarmiðini hjá Oddfríði M. Rasmussen um, at Merkið eigur at umboða fjølbroytni, svarar Bill Justinessen eitt avgjørt ja, men leggur afturat, at tað stendur í lógini, at flaggið ikki skal háðast, og sambært Oddfríði merkir tað at háða og vanvirða flaggið tað sama sum fjølnbroytni, sigur Bill Justinussen. Hann heldur fram við at nevna útsagnirnar hjá Maluni Marnsersdóttur um, at fólk mála Merkið á andlitið til landsdystir, men sambært Bill er hetta nakað, sum lyftir okkara tjóðskap, eins og fótbóltslandsliðið eisini ger sambært honum. Hinvegin metir hann, at tað sum Ole Wich hevur gjørt setir Føroyar í eitt vánaligt ljós.

- Eg haldi, at Ole Wich dregur virðingina fyri listini niður. Eg nevndi Ingálv av Reyni í kjakinum, og kundi nevnt fleiri onnur. sigur Bill, og hesi metir hann standa fyri eini positivari list. Hinvegin metir hann Ole Wich standa fyri eini negativari list.

Spurdur, um hann so viðgongur, at tað, Ole Wich ger, er list, sigur Bill Justinussen:

- Í mínari verð er tað ikki list, men eg kann ikki gera av, hvat er list, tí øll kunnu kalla seg listafólk, men í mínari verð er ein listafólk, um onnur kalla ein tað. Tað kann samanberast við orðið "kristin", sum bara kemur fyri eina ferð í Bíbliuni, men tá varð orðið brúkt av øðrum um tey kristnu.

Spurdur, um hann við at nevna kristindómin í samfelagskjakinum ikki er við til at taka patent upp á kristindómin, sigur Bill Justinussen, at ein og hvør kann kalla seg kristnan, og at hann bara kann tosa fyri seg, og tí sigur hann seg ikki skilja spurningin. Hann sambært hetta við, at Tjóðveldisflokkurin kallar seg ein tjóðveldisflokkur, men at hetta ikki merkir, at aðrir flokkar ikki kunnu hava hetta sum aðalmál. Hann er ikki samdur í teimum, sum leggja Miðflokkin undir at siga, onnur ikki at vera kristin, av tí at flokkurin sjálvur kallar seg kristnan.

### Listafólk erkvisin

Bill Justinussen sigur, at Miðflokkurin hevur størstu virðing størsta partinum av listafólkunum í Føroyum, men heldur, at listafólk eru ov erkvisin, tá teirra viðurskifti verða viðgjørd. Í øllum førum tey, sum fáa almennan stuðul.

- Listin er frí, men tá politikarar játta pening til list, er hon fíggjað við skattaborgarans peningi, og tí hevur ein politikari skyldu at meta um, hvat pengarnir fara til. Men tað hevði verið keðiligt um tað kom út, at Miðflokurin var ímóti listini, sigur Bill Justinussen, sum tó leggur dent á, at listin ikki skal brúkast til at sláa hvønn annan í høvdið við.

Spurdur um tað sama er galdandi fyri kristindómin, svarar hann avgjørdur:

– Ja!

Bill Justinussen sigur seg annars vera samdan í, at tað er týdningarmikið heldur at fara eftir bóltinum enn manninum, og tekur tí kraftiga frástøðu, sum hann orðar seg, frá eini heimasíðu, sum í hesum døgum niðurger persónin Ole Wich. Í sjónvarpskjakinum týskvøldið segði Bill Justinussen annars, at ein føroyingur neyvan hevði gjørt myndirnar av Merkinum, ið Ole Wich, sum av uppruna er dani, hevur gjørt.

– Eg vildi ikki fara eftir manninum, tá eg kallað i Ole Wich dana, men tað var fyri at finna eina orsøk og ikki fyri at leggja eftir manninum, sigur Bill Justinussen.